## Fjala pengar uttanlands

Í USA hevur Barrack Obama, forseti, gjørt Komngressini greitt, at stjórnin fer at gera alt fyri at forða fólki og feløgum at flyta pengar í skattaskjól uttanlands, uttan at skattavaldið fær tað at vita. Obama hevur sagt, at málið hevur skund, og ein nevnd hjá Kongressini er farin undir hoyringar í sambandi við málið. Amerikonsku skattamyndugleikarnir meta, at tað almenna missir umleið 100 milliardir dollarar ella góðar 590 milliardir krónur um árið í skatti av pengum, sum verða sendir í skattaskjól aðrastaðni.



## Kreppan rakar ófaklærd

Tað seinasta árið hava 10.000 áfaklærdir danir mist arbeiðið, og talið á arbeiðsleysum dønum veksur sum heild við rúkandi ferð, skrivar Politiken. Í februar vóru næstan 30.000 av limunum í 3F arbeiðsleysir, og tað svarar til 11,2 prosent. Fyri einum ári síðani var talið 6,7 prosent. Per Kongshøj Madsen, professari, sigur við Politiken, at tey ófaklørdu eru tey fyrstu, sum missa arbeiðið, tí tey arbeiða vanliga innan framleiðslu og goymslu ella sum bilførarar, og tá fólk keypa og brúka minni, minkar arbeiðið hjá júst hesum bólkunum fyrst. Professarin væntar, at 120.000 danir vera arbeiðsleysir í heyst.




**FAKTA**

Rakstrarúrslitið hjá IRF 2000 – 2006 (mió. kr.)

| | |
|---|---|
| 2000 | 3,5 |
| 2001 | 4,4 |
| 2002 | 2,8 |
| 2003 | 6,2 |
| 2004 | 6,0 |
| 2005 | 6,5 |
| 2006 | 3,3* |

* Virksemið niðurlagt longri tíðarskeið vegna útbygging. Máttu senda rusk av landinum.

Eginognin hjá IRF 2001 – 2006 (mió. kr)

| | |
|---|---|
| 2001 | 12,1 |
| 2002 | 15,4 |
| 2003 | 21,6 |
| 2004 | 27,7 |
| 2005 | 34,9 |
| 2006 | 38,1 |

*IRF hevur monopol á ruskmarknaðinum, og bæði privat og kommunurnar, ið eiga IRF, føla seg útistongd fyri ávirkan. – Øll nýhugsan verður kvald, bara tað er ein privatur, ið bjóðar seg fram, sigur Johnny Kruse, ið ætlaði at bjóða seg fram at pressa og koyra rusk fyri kommunur. Tær ætlanir eru sleptar nú*
*Mynd: Rógvi Nybo*

# Kommunalt monopol kostar milliónir

**Nýhugsan og menning verður kvald í somu løtu, hon er nevnd. Tað heldur Johnny Kruse, ið arbeiddi við ætlanum um at pressa rusk fyri kommunur. – Men IRF ræður á marknaðinum, og har skal eingin koma at blanda seg. Samstundis kostar hetta kommununum milliónir árliga, hóast tað eru tær, ið eiga IRF, sigur Johnny Kruse**

MONOPOL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

– Kommunurnar sjálvar grenja dúliga um, at tær betala fyri for nógva luft. Tað sigur Johnny Kruse, út frá teimum royndum hann hevur av at tosa við ymsar kommunur í landinum.

Johnny Kruse hevði eina ætlan, ið gekk út upp á at pressa rusk fyri kommunurnar og koyra tað á brennistøðina fyri kommununa. Hann hevði funnið eina passaliga bingju á umleið tíggju rúmmetur, eins og flestu ruskbingjurnar í landinum eru. Harafturat kundi hon lættliga togast upp á ein vanligan lastbil og tømast á brennistøðini, og síðan setast upp á pláss aftur.

Sjálvur hevur hann lastbil, og var tað ein liður í ætlanini, at hann sjálvur bjóðaði seg fram at koyra ruskbingjuna.

### Spara nógv við at privatisera

– Fyri kommunurnar og landið loysir tað seg á tann hátt, at teir spara nógva koyring og harvið eisini nógv $CO_2$ útlát. Ein pressubingja tekur millum seks og tíggju ferðir so nógv rusk sum ein vanlig bingja, og tað sigur seg sjálvt, at tá verður ikki neyðugt at tøma líka ofta. Harafturat kundi koyringin verið bjóðað út, tí tá er ikki longur neyðugt við serútgjørdum bilum, ið kosta tað hvíta út av eygunum. Tá kann ein og hvør við lastbili taka lastina uppá og koyra hana á brennistøðina. Har eru altso nógvir pengar at spara, greiðir Johnny Kruse frá.

Fyri nógvu árum síðan yvirtók IRF ruskkoyringina frá privatum, og eru eingi útlit fyri at nakað av virkseminum hjá IRF kemur á privatar hendur aftur. IRF eigur í dag allar liðirnar í innsavningini.

### Gjalda fyri luft

– Í dag verður ruskið als ikki stúvað, tá tað verður koyrt í bingjurnar. Tá IRF tekur móti ruskinum, so siga teir jú at tað eru 10 rúmmetrar í eini 10-rúmmetur bingju, men veruleikin er at tað sum oftast kanska ikki eru meiri enn 6 rúmmetrar brúktir. Tí betala kommunurnar fyri rættiliga nógva luft millum ár og dag, og tað vita tær eisini sjálvar av, greiðir Johnny Kruse frá.

Hinvegin er tað einki, sum nøkur av teimum følir at tær kunnu ella vilja gera nakað við, sambært Johnny Kruse.

### IRF ein órørandi pengamaskina

Tá Johnny Kruse tosaði við kommunurnar tóku tær allar væl ímóti, og allar virkaðu sera áhugaðar í tí, hann hugsaði. Tó var ein felagsnevnari fyri allar kommunurnar.

– Tær spurdu allar, jamen hvat við IRF. Og tað vísir seg sum at IRF er ein órørandi pengamaskina, sum eingin torir at gera nakað við, hóast tað eru kommunurnar sjálvar, ið eiga IRF, sigur Johnny Kruse.

Hann greiðir eisini frá, at óansæð hvønn veg hann vendi sær, so føldi hann tað sum at hann rendi seg í IRF.

### Mugu gjalda trífalt fyri pressað rusk

Á hvørjum ári verða nógvir pengar á fíggjarætlanum hjá kommunum nýttir til at savna inn og sleppa av við rusk. Summar kommunur eru byrjaðar at royna ymiskt fyri at spara á økinum, men hetta verður samstundis revsað av IRF.

Eitt nú hava nakrar kommunur sjálvar fingið sær pressubingjur. Afturfyri hevur IRF boðað frá, at pressað rusk kostar trífalt at sleppa av við, samanborið við vanligt rusk.

Poul Andrias Joensen, stjóri í IRF, sigur, at filosofiin er tann, at alt er nøgd.

– Flestu pressur trýsta upp til tríggjar ferðir, og tí verður prísurin eisini trífaldaður, sigur Poul Andrias Joensen.

## Eingin kann gera tað bíligari enn vit

**Stjórin í IRF, Poul Andrias Joensen, vísir staðiliga aftur, at tað er ov dýrt og óeffektivt fyri kommunurnar við verandi skipan. – Eg trúgvi lítið, at nakar kann gera tað bíligari enn vit, sigur Poul Andrias Joensen**

MONOPOL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Okkara bilar koyra eftir eini neyvt tilrættislagdari rutu, og tí trúgvi eg at tað hevði blivið til nógv meira koyring, skuldu vit fingið boð um avheinting, hvørja fer ein bingja var full. Tað sigur Poul Andrias Joensen, stjóri í IRF.

Hann heldur lítið um umskipa ruskinnsavningina við pressum og privatum avheintingum.

- Sum er nú verður alt mett eftir rúmmetrum. Hvørki vit ella brennistøðin á Hjalla hava eina vekt, og tí fáa vit ikki sett prísin eftir vekt. Men flestu pressur trýsta upp til tríggjar ferðir, og tí er prísurin á pressaðum ruski trífaldur.

### Pressa líka væl

Harafturat heldur hann tað als ikki verða neyðugt við pressum.

- Okkara bilar hava serútgjørdar pressur innbygdar. Og okkara bilar trýsta ruskið upp til eini fimm ferðir, og tískil verður ruskið pressað tá tað verður avheintað. Vit hava eisini roknað alt hatta út fyri einum tólv árum síðani, og fyri útlátið av $CO_2$ er hetta eisini tann besti mátin. Tá vit yvirtóku koyringina spardu vit eisini umleið seks milliónir um árið, og tí haldi eg ikki nakar kann gera tað bíligari og betri enn vit, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri í IRF.